## Alex Ferguson ákærdur

*Enska fótbóltssambandið hevur nú ákært Manchester United venjaran fyri vánaligan atburð í samband við tapið móti Chelsea týskvøldið*

Sir Alex Ferguson var í øðini eftir dystin móti Chelsea. Hann helt lítið um fleiri dómara avgerðirnar, sum hann metti hava stóra ávirkan á úrslitið í dystinum. Tað var í samrøðu við Manchester United sjónvarpsrásina, MUTV, at hann setti stór spurnartekin við dómaran Martin Aktinson.

Nú hevur enska fótbóltssambandið ákært Sir Alex Ferguson, sum hevur ein treytaðan dóm frá 2009, tá hann setti spurnartekin við formin hjá Alan Wiley. Velur Sir Alex Ferguson at góðtaka ákærurnar, so fær hann sambært Dailymail helst leikbann í ein dyst umframt teir báðar hann hevur sitandi á sær frá 2009. Velur hann hinvegin ikki at játta seg sekan og tapur, so verður leikbannið fýra dystir.

Sambært Dailymail, so er Sir Alex Ferguson eisini í øðini inn á MUTV, fyri ikki at sensurera samrøðuna eftir dystin móti Chelsea. Hann hevur tí valt at avlýsa samrøðuna, sum hann annars altíð hevur við MUTV undan dystinum. Tað er bara aðru ferð, at hann ikki vil tosa við MUTV undan einum dysti.

Hann er eisini óður inn á bretsku miðlarnir, sum hann metir hava verið eftir Wayne Rooney síðani Wigan dystin. Sir Alex Ferguson hevur tí eisini avlýst tíðindafundin við vanligu føljmiðlarnir í morgin.

# Pipar og salt




Kann tulkast eftir tørvi

## Í MORGIN




Fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar. Seinnnapartin veksur hann vindin upp í einn strúk av útsynningi, men væntandi turt. Hitin millum 4 og 7 stig.

## SUNNUDAGIN




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynninfi og fyrrapartin regn, seinnapartin ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.

## MÁNADAGIN




Hvassur vindur upp í skrið av útsynningi og ælingnur, partvís kavi, men eisini sólglottar og hitin millum 1 og 4 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og vestri, mikudagin minni vindur av útnyrðingi. Ælimgur, partvís kavi og hitin millum 0 og +4 stig

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eutt hátrýst, 1035 hPa. í útsynning úr Íslandi kemur handavegin og verður yvir Føroyum leygardagin.




**Komandi nátt:**
Hátrýstið vestan fyri Føroyar fer eystureftir. Lágtrýstið við Hvarvið fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani verður væntandi við Føroyar sunnunáttina.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 132 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | -9 | Tromsø | -1 | Moskva | -13 | Athen | 14 |
| Reykjavík | 8 | Bergen | -2 | Berlin | -6 | Beijing | 11 |
| Tórshavn | 7 | Oslo | -9 | Paris | 3 | New Dehli | 20 |
| Lerwick | 4 | Stokkhólm | -6 | Madrid | 15 | Bangkok | 32 |
| Aberdeen | 7 | Keypmannah. | -4 | Róm | 11 | Sydney | -- |
| London | 8 | Helsinki | -19 | Malorca | 15 | New York | 2 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

4. mars Tendring
6. mars Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. mars | 06:19 | 18:39 | 05:19 | 17:39 | 05:34 | 17:54 | 08:19 | 20:39 | 09:19 | 21:39 | 04:34 | 16:54 | 03:34 | 15:54 | 06:34 | 18:54 | 07:34 | 19:54 | 06:04 | 18:24 | 07:19 | 19:39 |
| 5. mars | 06:58 | 19:17 | 05:58 | 18:17 | 06:13 | 18:32 | 08:58 | 21:17 | 09:58 | 22:17 | 05:13 | 17:32 | 04:13 | 16:32 | 07:13 | 19:32 | 08:13 | 20:32 | 06:43 | 19:02 | 07:58 | 20:17 |
| 6. mars | 07:36 | 19:55 | 06:36 | 18:55 | 06:51 | 19:10 | 09:36 | 21:55 | 10:36 | 22:55 | 05:51 | 18:10 | 04:51 | 17:10 | 07:51 | 20:10 | 08:51 | 21:10 | 07:21 | 19:40 | 08:36 | 20:55 |
| 7. mars | 08:12 | 20:30 | 07:12 | 19:30 | 07:27 | 19:45 | 10:12 | 22:30 | 11:12 | 23:30 | 06:27 | 18:45 | 05:27 | 17:45 | 08:27 | 20:45 | 09:27 | 21:45 | 07:57 | 20:15 | 09:12 | 21:30 |
| 8. mars | 08:48 | 21:07 | 07:48 | 20:07 | 08:03 | 20:22 | 10:48 | 23:07 | 11:48 | - | 07:03 | 19:22 | 06:03 | 18:22 | 09:03 | 21:22 | 10:03 | 22:22 | 08:33 | 20:52 | 09:48 | 22:07 |